VEÐRIÐ

Petur Skeel Jacobsen, veðurfrøðingur greiðir frá um veðrið



Veðrið í dag:
Fyrrapartin andøvsgul upp í ein strúk av útsynningi og yvirhøvur turt og sólgottar. Hitin millum 4 og 7 stig. Seinnapartin gul til stívt andøvsgul av vestri og útnyrðingi og ælingur, partvís kavi. Hitin fellur niður móti frostmarkinum.



Veðrið leygardagin:
Gul til stívt andøvsgul av útnyrðingi og norði og kavaælingur, men eisini sólglottar. Hitalagið millum ÷2 og ÷5 stig.



Veðrið sunnudagin:
Gul til stívt andøvsgul av norði og yvirhøvur turt og sólglottar. Hitalagið millum ÷3 og ÷6 stig.

Veðrið mánadagin og týsdagin:
Mánadagin upp í hvassan vind av vestri og regn ella vátakavi, og hitin beint omanfyri frostmarkið. Týsdagin hækkar hann upp í norðan og kavaælingur. Hitin fellur niður í ÷4 til ÷7 stig.

Fiska væl men prísir í botni

Stór óvissa er um framtíðina hjá Næraberg og Sjúrðarberg men hjá hinum JFK-Trolarunum sær tað betri út.

FISKIVINNA
Búi Tyril
tyril@PRnewsMedia.com

Sjúrðarberg og Næraberg við bryggju í Klaksvík
Foto: Maria Olsen/PRnewsMedia

Næraberg fór av Klaksvík millum nátt og morgun hósdagin. Tann 85 arbeiðspláss stóra flótandi surimi- og fiskamjølverksmiðjan skal á hesum sinni suður til leiðirnar við Rock All at royna í altjóða sjógvi, aftan á at kvotan i ES sjógvi júst er uppfiskað á hesum sinni. Fiskiskapur og framleiðsla hevur riggað vel hjá Næra-bergi. Seinasta túr kom trolarin longu heim tjokkfullur aftan á tríggjar vikur. Men hóast úrtøkan var heili 780 tons av surimi og 230 tons av fiskamjøli, so fæst í krónum og oyrum ikki tað stóra burtur úr.

– Prísirnir eru í botni, og vit hava eina stóra goymslu sum er ring at sleppa av við, staðfesti stjórin á JFK Trol, Hanus Hansen.

– Arbeiðið umborð á Næra-bergi hevur annars gingið sera væl bæði hvat fiskiskapi og framleiðslu viðvíkur.

Sum skilst er óvist hvussu leingi royndarprojektið Næraberg, sum fyri stóran part verður fíggjað av einum norskum ríkmanni, kemur at halda fram.

– Vit ætla í øllum førum at halda fram so leingi Røkke er sinnaður at standa við tann fíggjarliga endan, legði Hanus Hansen afturat.

– Vit høvdu kunnað sagt, at verkætlanin var vælevdnað í dag, um ikki tað var fyri prísirnar; við teimum núverandi prísunum er tað sum við laksinum, framleiðslukostnaðurin liggur á hædd við søluprísin, og tá er einki lønsemi í.

Samstundis hevur rækjuskipið hjá JFK Trol, Sjúrðarberg, ligið við kai síðani á tollaksmessu. Inntil víðari verður einki gjørt har, og við verandi støðu í føroyskari rækjuvinnu eru útlitini alt annað enn góð; men fyrr ella seinni kann roknast við at skipið má seljast ella leigast út.

Hitt rækjuskipið hjá JFK Trol, Fuglberg, er nevniliga leigað út til fiskiskap í Grønlandi, og tað gongur væl við tí.

Hinir verksmiðju trolararnir, Sundaberg og Skálaberg, eru í løtuni til fiskiskap og royna eftir toski og hýsu í ávikavist russiskum og norskum sjógvi. Fiskaríið er hampiligt, og teir koma væntandi heim í mars og apríl.

Hitalagið kring knøttin

Illulisat	÷11
Nuuk	÷7
Qaqortoq	÷5
Ammassalik	÷7
Saint John's	÷6
Halifax	÷3
Reykjavík	8
Seyðisfjørður	7
Tórshavn	7
Lerwick	7
Aberdeen	7
London	7
Tromsø	0
Bergen	5
Oslo	–
Stokkhólm	0
Keypmannah.	4
Helsinki	÷17
Moskva	÷15
Berlin	3
Warzawa	0
Kiev	÷1
Bukarest	3
Paris	6
Madrid	8
Róm	12
Malorca	13
Athen	11
Malta	12
Tunis	14
Beijing	12
New Dehli	23
Bangkok	32
Jakarta	26
Sydney	–
New York	3
Miami	11
Los Angeles	13
Meksikobýur	13
Panama	31
La Paz	11
Rio de Janeiro	–
Buenos Aires	23

LUFTTRÝSTIÐ

Eitt hátrýst, 1035 hPa. yvir Skotlandi fer eystureftir. Eitt lágtrýst, 997 hPa. í útsynning úr Íslandi fer móti Grønlandsfjørðinum.



Lágtrýstið yvir Grønlandsfjørðinum fer eystureftir. Ein kuldabrúgv frá Lofoten til havið millum Íslands og Føroya fer í landsynning og hevur kalda luft við sær.

HITALAGIÐ



Hitalagið mált frá 18/02 kl. 06⁰⁰– 19/02 kl. 06⁰⁰. Hitin í gjár: 7,7°
Minsti hiti máldur í feb.: ÷11,0° - Mesti hiti máldur í feb.: 11,0°

AVFALLIÐ



Avfallið: 0,0 mm – mált frá 18/02 kl. 06⁰⁰–19/02 kl. 06⁰⁰
Avfallið higartil í februar: 68,6 mm

I EINUM SAMFELAG
HAR TEY VEIKASTU
HAVA TAÐ GOTT,
HAVA ØLL TAÐ GOTT

WWW.JAVNI.FO

JAVNI

VESTFALLSKYRRINDI

16. februar: Mánin næstur jørðini
20. februar: Tendring

Kelda: Almanakkin 2004

Dagur	Suðuroyar-/Vágafirði fp.	sp.	Skúvoyar-/Skopunarfirði fp.	sp.	Hestfirði/Sundalagnum fp.	sp.	Vestmannasundi fp.	sp.	Mykinesfirði fp.	sp.	Nólsoyarfirði fp.	sp.	2 fj. í LS úr Mjóvanesi fp.	sp.	Leirvíksfirði/Haraldssundi fp.	sp.	Kalsoyar-/Svínoyarfirði fp.	sp.	Hvannasundi fp.	sp.	Fugloyarfirði fp.	sp.
20. feb	06.38	19.03	05.38	18.03	05.53	18.18	08.38	21.03	09.38	22.03	04.53	17.18	03.53	16.18	06.53	19.18	07.53	20.18	06.23	18.48	07.38	20.03
21. feb	07.27	19.51	06.27	18.51	06.42	19.06	09.27	21.51	10.27	22.51	05.42	18.06	04.42	17.06	07.42	20.06	08.42	21.06	07.12	19.36	08.27	20.51
22. feb	08.13	20.35	07.13	19.35	07.28	19.50	10.13	22.35	11.13	23.35	06.28	18.50	05.28	17.50	08.28	20.50	09.28	21.50	07.58	20.20	09.13	21.35
23. feb	08.55	21.16	07.55	20.16	08.10	20.31	10.55	23.16	11.55	—	07.10	19.31	06.10	18.31	09.10	21.31	10.10	22.31	08.40	21.01	09.55	22.16

5 707265 100050 >